Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	5. des. 2024
Mál nr.:	23/20058-4
Málsviðgjørt:	Terji Beder
Ummælistíð:	4 vikur
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð um broyting í kunngerð um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum, sum broytt við kunngerð nr. 109 frá 25. juni 2021
(Frágreiðandi heiti)

§ 1

Í kunngerð nr. 100 frá 17. juni 2021 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 23 verður orðað soleiðis:
"**§ 23.** Landsstýrismaðurin setur eitt samstarvsráð fyri útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing. Endamálið við ráðnum er at fremja samstarv millum teir partar, ið varða av útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing og av sjúkrarøktarfrøðiyrkinum sum heild.
Stk. 2. Ráðið verður mannað við:
1) einum umboði, ið landsstýrismaðurin tilnevnir,
2) einum umboðið, ið Kommunufelagið tilnevnir,
3) einum umboðið, ið Fróðskaparsetur Føroya tilnevnir,
4) einum umboði, ið Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar tilnevnir,
5) einum umboði, ið landsstýrismaðurin við heilsumálum tilnevnir,
6) einum umboði, ið sjúkrahúsverkið tilnevnir, og
7) einum umboði, ið tey sjúkrarøktarfrøðilesandi velja.

Stk. 3. Partarnir tilnevna, so vítt møguligt, ein mann og eina kvinnu.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin velur formann og skrivara í ráðnum. Ráðið ger sjálvt sína starvsskipan."

2. Í § 23 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 4.* Ráðið verður sett fyri eitt fýra ára tíðarskeið. Ráðið ella einstakir ráðslimir kunnu vera endursettir."

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen